Jólakappingin hjá Sosialinum:

# Laila vann tað heila



Laila Monika Hjelm í Klaksvík gjørdist hepni vinnarin av 10 kassum við Faxe-Kondi sodavatni

Laila Monika Hjelm í Klaksvík gjørdist hepni vinnarin av 10 kassum við Faxe-Kondi sodavatni í jólakappingini í Sosialinum.

Laila Monica, sum fyllir 13 ár í februar, gongur í Ósáskúlanum í Klaksvík. Hon er sera áhuga í djórum, og heima hevur hon fimm hamstarar, sum hon fegin vildi vísa Sosialinum, tá vit komu við vinningunum.

Laila Monika er sera aktiv í flogbólti og spælir hon horn í hornorkestrinum. Sum nógv onnur ung í Klaksvík er hon eisini virkin í Virkishúsinum, men hon skiftur eisini eitt sindur ímillum undómsarbeiði í samkomunum Betesda og Emmaus.

## Andlát og jarðarferðir

**Edith Ragnarson, fødd Dam, frá Norðskála**, búsitandi í Íslandi, andaðist mánadagin 68 ára gomul. Jarðarferðin verður frá kirkjuni í Vik Nørdal hósdagin 1. februar.

**Ingibjørg Patursson Restorff, ættað úr Kirkjubø búsitandi í Tórshavn**, andaðist sunnudagin 21. januar, 95 ára gomul. Jararferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin kl. 13.00 Sungið verður úr sálmabókini

Kistan við **Narvi Norðberg, Strendur**, fer úr Nerija á Skála hósdagin kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Narva, kunna lata eina peningagávu til Nerija; konta í peningastovninum.

## 90 Føðingardagur

Fríggjadagin 26. januar verður Virgar Frýdal, Tórshavn (ættaður av Velbastað), 90 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

## 95 ára føðingardagur

2. februar fyllir Sofie Sevdal í Fuglafirði, vanliga nevnd Fía á Regni, ættað úr Leirvík 95 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá dóttrini Oslu Sevdal á Kambsdali, *leygardagin, 27. januar frá kl. 16 til 21.*

Fyri 30 árum síðan:

# Váðasteinur av bakkastokki

22. januar 1977 fór nýbygningur nr. 22 av bakkastokki á Tórshavnar Skipasmiðju.

Talan var línu og frystiskipið »Váðasteinur«, sum Johan Simonsen í Havn lat byggja.

Tað var kona Johan Simonsen, Sigrid, sum doypti skipið. 17. mars 1977 var »Váðasteinur« sín fyrsta royndartúr.

»Váðasteinur« er 39 m langur og er merktur 310 tons brutto. Byggiprísurin var umleið 8 milliónir krónur.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1977*



*Sigrid Simonsen doypir »Váðastein«, meðan Johan Simonsen, skipari, og Kjartan Mohr frá Skipasmiðjuni eygleiða*




*»Váðasteinur« fór sín fyrsta royndartúr 17. mars 1977*

**Prógv**

Turid Kruse, Kunoy, hevur tann 22. januar 2007 lokið prógv sum bachelor í námsfrøði á »Gladsaxe Seminariet«.

Marita Wolles, Klaksvík, hevur tann 22. januar 2007 lokið prógv sum bachelor í námsfrøði á »Gladsaxe Seminariet«.

Sóleyð Joensen, Sandavágur hevur tikið prógv sum cand.mag. í enskum og sponskum á Københavns Universitet. Sóleyð arbeiðir í løtuni í Vinnumálaráðnum, og hon undirvísir á Fiskivinuskúlanum í Vestmanna og í kvøldskúlanum í Miðvágs- Sandavágs skúla.

Mánadagin 22.1-07 fekk Havstein Klein, Saltangará prógv sum master i teologi, cand theol frá lærda háskúlanum í Stavanger MHS.

**Dagurin**

**25. januar. Pálsmessa.** Verður hildin til minnis um umvending Paulusar á leiðini til Damaskus í árinum 36. Á pálsmessu koma súlan og lomvigin at landi. Súludagurin er hátíðardagur í Mykinesi, og í eldri tíðum varð dansað har henda dagin. Erlendur biskupur var bispvígdur hendan dagin í 1269.

Sosialurin
www.sosialurin.fo